Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Bjarni Clementsen, Tórshavn:

# Ein eldsál lagt frá sær

**Fríggjadagin 22. oktober var almenn mótøka á Verkstaðnum Vón á Argjum í samband við at Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini, er farin úr starvi**

MÓTTØKA

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Fríggjadagin var almenn mótøka á Verkstaðnum Vón á Argjum í samband við at Bjarni Clementsen, leiðari á Serstovnadeildini, er farin úr starvi*

Eftir at hava starvast í 24 ár sum leiðari innan serstovnaøkið í Føroyum, hevur leiðarin á Serstovnadeildini, Bjarni Clementsen, valt at siga seg úr starvi og er farin av royna seg við øðrum avbjóðingum. Hann hevur tikið við sum leiðari á Dagstovninum í Kvívík.

Móttøkan á Verkstaðnum Vón byrjaði við at Mary í Garði, stjóri fyri Heimarøktina og Serforsorgina, sum serstovnadeildin er er partur av, beyð øllum at vera vælkomin. Hon helt eisini eina røðu fyri Bjarna.

Onnur sum hildu røðu vóru t.d. Malena Arnholdsdóttir, formaður í Javna, og Ingrid Dalsgaard, leiðari fyri heimið fyri heilaskadd. Ein av brúkarunum, Símun Petur Zachariasen úr Klaksvík, segði, at hann hevði nógv at takka Bjarna Clementsen fyri, hann hevði verið við til at broytt hansara lív.

Tey, sum hildu røðu á móttøkuni, vóru samd um, at Bjarni hevur verið ein eldsál innan serstovnaøkið í Føroyum. Hann hevur verið við til at bygt Serstovnadeildina upp frá botni av, og hann hevur lagt nógva orku í at bøta um korini hjá teimum menningartarnaðu.

Serstovnadeildin, ið varð stovnað fyri 10 árum síðan, er ein eftirkomari av virkseminum, sum Statens Åndssvageforsorg byrjaði í Føroyum í 1971, fyrst undir leiðslu av Storstrøms Amt í Danmark, síðani undir leiðslu av Socialstyrelsen/ Sosialministeriunum í Keypmannahavn.

Seinni bleiv navnið Statens Åndssvageforsorg skift út við navnið Andveikraverndin, sum í 1988 bleiv ein landsstovnur undir Almannastovuni og Føroya Landsstýri.

Andveikraverndin bleiv avtikin í 1994 og virksemið být sundur millum deildir á Almannastovuni. Í 1998 bleiv Serstovnadeildin ein partur av Heimarøktini og Serforsorgini, tá virksemið hjá Almannastovuni bleiv býtt í tveir stovnar undir Almanna- og Heilsumálaráðnum.



*Ingrid Dalsgaard, leiðari fyri heimið fyri heilaskadd, Sambýlið í Niðarugøtu, í Hoyvík, heldur røðu*



*Bjarni Clementsen fekk fleiri gávur og heilsanir undir móttøkuni*



*Malena Arnholdsdóttir, formaður í Javna, heldur røðu*



*Maud W. Hansen, leiðari fyri verkstaðin Vón á Argjum, saman við brúkarum og starvsfólkum*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Steinvør og Jákup Joensen diamantbrúdleyp

Í dag kunnu Steinvør og Jákup Joensen í Klaksvík halda teirra diamantbrúdleyp.

Steinvør er dóttur Oluvinu og Heina Heinesen úr Kunoy.

Tey eiga trý børn, Leivur, giftur Áslu við Keldu í Klaksvík, Ingun, gift Martin Jacobsen av Vatnsoyrum og Anna Maria, gift Pól Poulsen frá Ljósá, og Heini, føddur í 51, doyði bert 9 mánaðar gamal.

Abbabørnini eru 6 í tali: Steinvør, Theodor, Jákup, Sigmund, Andrias og Andru, og langommu og langabbadótturin er lítla Rebekka Fonn.

Tey ið kenna hesi hjún, munnu nokk sanna at tú ert millum skilafólk bæði so og so. Hugnalig, sum ein skjótt leggur merki til.

Steinvør, hábærslig og stillfør, ikki við tí stóra orðafloyminum og brýtur ongan av í orðadrátti. Situr inni við lívslangum vísdómi sum hon ongan hug hevur at reypa sær av í mannamúgvu, men kom bara inn á tvímanshond og gev tær tíð, merkir tú skjótt, at her er kvinna ið verd er at dvølja hjá, og tú fert ríkaður avstað og hevur fingið nakað at hugsa um. Hon fylgir væl við, og umsorgan hennara, ikki bert fyri sínum egnu, bæði í viðgongd og mótgongd, er fyrimyndarlig.



Jákup er sonur Malvinu, úr Árnafirði og Jákup Joensen, bónda í Gerðum, Klaksvík.

Best kendur hesi seinastu árini sum Jákup á Ternuni. Hann kundi havt so mong onnur skipanøvn klýggja uppi í sær og ikki bert tað, men mong onnur nøvn úr tindi í sjógv við.

Sum bóndasonur veit hann um alt á bø og í haga. Hvør tók hann aftur á fjalli, á báti, á skipsdekki, í maskinrúminum, á brimplássum og vit kundu blivið við.

Ein fjøllbroyttur maður. Urtagarður hansara hevur ikki bara verið til pynt. Stórt ríkidømi er komið úr honum hesi mongu ár.

Man Jákup ikki mangan hava fingið okkum í Betesda at ført fremstafingur í eygnakrókarnar, tá hann hevur borið sínar takkarbønir fram fyri frelsara sín, sum hann frá barnsbeini hevur tænt við ærufrykt. Nei ikki bert í skemtiløtum hevur hetta borist fyri.

Tað er ikki rúm til meira her. Tað kundi verið skrivað long lívssøga um tykkum.

Hjartaliga til lukku við degnum og havi eina góða samveru saman við tykkara kæru.

# Jóna Rasmussen í Galerie Focus

**Fríggjadagin 29. oktober kl. 16 til 18 byrjar seinasta framsýningin í ár í Galerie Focus í Havn**

Hesuferð er tað Jóna Rasmussen ið sýnir fram grafik og málningar.

Í myndunum hjá Jónu er symbolikkur, formurin er akkurátur og einfaldur.

Myndirnar eru sjónliga mettaðar av uppliving, tí hóast myndevni og tema er einfalt og konkret, er framburðarhátturin og myndamálið musiskt, lyriskt og abstrakt fyri nettup at fáa upplivingina, intuitiónina og kensluna fram.

Framsýningin verður opin til 12. november, týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.




*Jóna Rasmussen sýnir fram grafik og málningar í Galerie Focus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

David Walzer:

# Ísraelskur ambassadørur í Danmark

13. september 2004 varð 51 ára gamli David Walzer settur sum ambassadørur við ísraelsku ambassaduna í Keypmannahavn.

David Walzer var føddur í Ísrael 7. sepember 1953.

Frá 1976-80 tók hann BA-útbúgving í økonomi og miðeysturserfrøði á Haifa University.

Síðan hevur hann arbeitt á ymiskum ráðharrastovum í t.d. Kanada og Kenya.

Hann las týskt á Hebrew University of Jerusalem frá 1992-94, og arbeiddi sum konsul og ráðharri í Bonn í Týsklandi frá 1994-99.

Síðan 2000 hevur hann arbeitt sum stjóri á altjóða deildum undir ST.



Hann tosar enskt, týskt, arabiskt og hebraiskt.

David Walzer er giftur og eigur trý børn.




## Rætting

**Ikki Magnus men Finnur**

Í myndatekstinum undir eini mynd um HB-veitsluna á síðu 14 í blaðnum í gjár 26. oktober, stóð, at Magnus Hansen sat við klaverið. Rætta navnið er sjalvandi Finnur Hansen.

Við biðja orsaka misktakið.

**Sosialurin**

## Dagurin

**28. oktober. Tveggja ápostla messa**, Símun Selotes og Judas Taddeus. Søgnin sigur, at teir vórðu báðir dripnir í Persiu í árinum 71.

Á einum av kirkjubøstólunum sæst mynd av einum ápostli við gassa í hendi. Er helst annar av teimum, tí søgnin sigur, at teir báðir vórðu bardir til deyða.

Símun merkir *lítli Sámal*, og Judas merkir *av Juda ætt*.